# BILAR

SAMBAND
MAGGI GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fjórði hvør var ein Seat 600



*Í 1971 var fjórði hvør bilur í Spania ein Seat 600*

**Í 1971 var fjórði hvør bilur í Spania ein Seat 600, sum fyrstu ferð kom á marknaðin fyri 50 árum síðan**

BILAR

Liðin eru 50 ár síðan bilurin sum setti hjól undir Spania, Seat 600, kom á marknaðin fyrstu ferð.

Seat 600 er í veruleikanum ein Fiat 600, sum varð gjørdur í Spania í tíðarskeiðnum frá 1957 til 1973. Tilsamans vórðu gjørdir 800.000 Seat 600 hesi árini.

Fyri at fáa eina mynd av hvussu væl umtóktir Seat 600 vóru í Spania, sæst í hagtølum fyri 1971, at tá vóru 25 prosent av sponsku bilparkini Seat 600.

Spanska Seat bilverksmiðjan var stovnað í 1950. Fyrstu nógvu árini gjørdu teir Fiat bilar upp á licens til miðseiðis í 70-unum, tá teir høvdu sína egnu framleiðslu av bilum. Síðan 1990 hava Seat verið partur av VW-konsernini.

Navnið Seat merkir »Sociedad Española de Automóviles de Turismo«.

mg






*Seat 600 kom á marknaðin fyri 50 árum síðan*



*Seat 600 er í veruleikanum ein Fiat 600, sum varð gjørdur í Spania frá 1957 til 1973*

# Würth fakmessa fekk góða undirtøku

**Síðst í oktober skipaði Würth Føroyar fyri fakmessu á Hjalla, har teir saman við Würth í Danmark sýndu fram nakað av tí , sum fyritøkan hevur bjóða. Messan var sera væl vitjað, sigur Claus Christensen frá Würth Føroyum**

FRAMSÝNING



*Manningin á fakmessuni f.v.: Henning Jensen (Würth Danmark), Claus Christensen (Würth Føroyar), Henrik Skov (Würth Danmark), Bernhard Jacobsen (Würth Føroyar), Bent Lutzke (Würth Danmark) og Claus Nielsen (Würth Danmark)*



*Würth Føroyar skipaðu fyri fakmessu á Hjalla. Umleið 850 fólk vitjaðu framsýningina*

Claus Christensen frá Würth Føroyum sigur, at stórur áhugi var fyri framsýningini, sum fekk góða undirtøku. Umleið 850 fólk vitjaðu framsýningina teir tríggjar dagarnar. Hetta var nógv meira, enn teir roknaðu við. Fólk komu úr øllum landinum, heilt úr Sumba til Trøllanesar.

Hetta er fyrstu ferð, at vit hava skipað fyri eini slíkari fakmessu. Men tað verður avgjørt ikki seinastu ferð. Messan fekk so góða undirtøku at vit nú hava ætlanir um at hetta verður eitt afturvendandi tiltak, sigur Claus Christensen, sum saman við Bernhardi Jacobsen ferðast kring landið sum sølumaður hjá Würth Føroyum.

mg